

# KUNDU VERIÐ SJÁLVBJARGIN VIÐ EPLUM

Nú ræður um sum skjótast at fáa eplini í jørðina, sigur Peder T. Haahr, ráðgevi á Búnaðarstovuni

Randi Jacobsen

**Í góðveðrinum í seinastu viku fór Peder T. Haahr í royndarveltuna, sum Búnaðarstovan hevur á Miðgerði í Kollafirði.**

**Búnaðarstovan hevur annars eisini royndarveltu á Sandi.**

Í báðum veltum verða hvørt ár roynd nýggj eplasløg, men tey kendu sløgini verða eisini sett niður.

## 22 sløg

Í ár eru 22 sløg í royndarveltunum. Tað kann altíð vera, at okkurt nýtt eplaslag roynist væl, smakkar væl ella gevur nógva fold.

– Fyrr var vanligt, at eplini skuldu setast niður flaggdagin, og taðvar ikki av leið. Jú seinni verður sett niður, størri er vandin fyri svartaspillu, tí eplini bráðvaksa. Haraftrat kemur minni burturúrum, um eplini fáa meira tíð at vaksa, sigur Peder T. Haahr.

Hansara tilmæli er at seta niður í seinasta lagi tvær vikur inn í mai.

Ein keðilig spilla í mangari eplaveltur er rótasoppurin. Tilfar fæst at viðgera eplini móti hesum soppinum.

Peder T. Haahr hugnar sær í eplaveltuni, og hann hevur ilt við at skilja, at ikki meira verður velt av eplum í Føroyum. Og av rótum.

## Deiligt arbeiði

—Tað hevur einki uppá seg at fara út í veltuna nakrar hálvar dagar um várið og um heystið, tá ið veðrið er gott. Tað er gott fyri alt, sigur Peder T. Haahr.

Hann veit, at fleiri menn hava fingið sær maskinur at loysa fløg við bæði há sær sjálvum og fyri onnur.

– Vit kundu væl verið sjálvbjargin bæði við eplum og rótum, tí tað veksur væl í Føroyum, og tað má loysa seg, sigur Peder T. Haahr.